miðvikan

Nr. 09 • 09. jan. 2009

**Siðsøguligt tilfar**
í Sosialinum mikudagar



**Anton Petersen:**

# Sjómansheimið í Føroyingahavnini var hent

**Anton og pápi hansara Jens Kristian fara at rógva út í Grønlandi í 1949. Viðurskiftini vóru ikki altíð so væl skipað. Hetta kom aftur um brekku, tá ið teir eina ferð eru heimleysir í oyðimørk**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**2. partur**

## Ferð til Grønlands við forðingum

Í 1951 er pápi mín sjúkur, og eg fari við Marité, sum liggur og manglar fólk. Eg havi bátin Boga við. Hetta summarið var ikki farið í Ravnsoynna at rógva út frá landi. Tað var Arbejdernes Travlerdrift (A.T.) á Tvøroyri, sum átti Marité. Hon var bygd í Frankaríki og var trýmastrað skonnart. Hon var eitt vakurt skip og eitt framúr gott sjóskip. Marité bleiv fyri nøkrum árum síðan seld til Svøríki og sett í upprunastand og er í dag eitt av teim vakrastu skipum, sum eru til.

Vit fóru seint avstað. Tað bleiv so trupult at fáa fólk. Vit mynstraðu á Tvøroyri 29 juni. So var farið norður til Havnar at taka útgerð og at fáa nakrar manns afturat. Har fingu vit so tríggjar menn, tveir úr Kollafirði og ein úr Húsavík.

Síðani var farið til Grønlands, men á veg yvir varð lagt inn í Íslandi, tí enn tørvaði fólk. Ferðin yvir tók fýra samdøgur. Skipið hevði lítla maskinorku. Tað sigldi ikki meira enn einar fimm míl í góðum líkindum. Men var vindurin til vildar, og vit fingu seglini fyri, kundi hon hava reiðuliga góða ferð.

Í Íslandi var so eisini roynt eftir fólki, og har fingu vit níggju manns.Tað var óvant fólk, fleiri av teimum høvdu ikki verið á sjónum fyrr. Farið varð av Reykjavík, men tá ið vit høvdu siglt um leið eitt samdøgur, smeltaði annað krumtapsleiðið. Tað eydnaðist maskinmonnunum at skekla tað stemplið frá, hvørs leiði var smeltað, so vit fingu brúkt motorin. So varð siglt við seglum og hálvari motorkraft aftur til Reykjavíkar.

Har lógu vit í eina heila viku, áðrenn vit sluppu avstað aftur. Tað var langligt at liggja har so leingi, men hjá okkum, sum ungir vóru, gekk tíðin á ymiskan hátt. Vit vóru nógv í landi, so vit komu at kenna ein part av býnum.

So var farið avstað aftur. Veðrið var hampuliga gott. Vit vóru so í Ravnsoynni um Ólavsøkuna.

Vit róðu út frá Ravnsoynni eina tíð, og tað var brúkiligt fiskarí. Har mistu vit eisini tveir bátar av teimum fimm, sum hoyrdu til skipið. Tað kom ein stormur av útsynningi. Bátarnir hingu aftur úr skipinum. Endin slitnaði, og bátarnir róku inn á land og brotnaðu illa. Annar báturin bleiv afturgjørdur. Bátarnir vóru smáir, fimmmannafør ella so.



*Manningin á Marité frá 1952. **Aftast til vinstru**, Tummas Niclasen, Magnus Petersen, Oluf Niclasen, Tórolv Hammerfoss, Oliver Petersen. **Næst aftasta rað** Steintór Djurhus,Vermund Niclasen, Mikal Tausen. **Fremst frá vinstru** Jóan Hendrik Madsen, Jens Kristian Petersen og Anton Petersen*



*Hetta er í 1952. Ísurin hevur troðkað inn í fjørðin í Ravnsoynni, og fylgt alt upp. Her standa Steintór og eg á einum ísflaka*



*Her liggja vit við Marité inni í Ravnsoynni, har vit fiskaðu fyri tað mesta. Her liggur ein bátur hjá Marité uppá síðuna*

## Túrurin, har alt mundi enda galið

Eitt skifti vóru vit norðuri í Hellefiskaoyggjunum. Skipið lá uppankrað, og so royndu bátarnir har um leiðir. Fyrsti bestimaður, sum var formaður á bátinum hjá okkum Boga, finnur so uppá, at vit skuldu fara norður í Grátufjørðin at royna. Lítið var at fáa, har sum vit lógu. Men henda morgunin stóð hann og hótti við illveðri av lágætt. Vindurin